Tað var eitt heilt ávíst tíðarskeið í søguni, at Jesus varð føddur. Gud er ein góður samskiftari – menniskja mátti fyrst til fulnar skilja gleðiboðskapin um, at Guds ríki var komið nær. Rómverska ríkið var ein sera góð mynd uppá hetta. Tá ið rómverska ríkið legði lond og økir undir seg, so var ein landshøvdingi settur, sum skuldi stýra landinum, soleiðis at økið skuldi vera ein avspegling av Róm. Hetta var fylling tíðarinnar, so menniskjuni kundu skilja hetta, at eitt annað ríki var komið nær – Guds ríki – hvørs virðir, mentan o.s.fr. skuldu verða undirløgd tað himmalska ríkið. Her var ein mynd uppá tað, sum skuldi fara fram.

Í Jóh. 20, 21 stendur: „Friður veri við tykkum! Sum Faðirin hevur sent Meg, sendi Eg tykkum“.

Tú og eg eru eisini send! Eingin av okkum kann siga, at hann ikki er sendur. Vit eru undirløgd tann fyrsta ápostulin, Jesus, og eru ápostolisk, við at vit eru send.

Vit hava ápostlar í samkomuni, sum eru ein tænastugáva til Kristi likam, sum skal hjálpa okkum at vaksa upp til høvdið, sum er Kristus. Men vit eru øll ápostolisk, t.v.s. send til at ávirka henda heimin. Í Filippibrævinum 4,4 stendur, at vit skulu vera himmalljós í heiminum, latið okkum saman draga himmalin niður hvønn dag, so menniskjuni kunnu smakka og síggja, at Harrin er góður.

*MJ*

## BARNAMØTINI

**byrja aftur 25. aug. kl. 11.30**

## Samkomudagur í Skóta-húsinum við Løkin



Leygardagin 7. september verður samkomudagur, har vit fara at hugna okkum saman frá morgni til kvølds.

Vit gleða okkum til dagin, har ommur, abbar, foreldur og børn, fara at verða saman ein heilan dag, bara við hugna.

Vit fara at eta saman, spæla saman, dansa og syngja saman og hugna okkum max.

Hesin dagurin er fyri alla familjuna.



Filadelfia
„Himmal á jørð“

# Okkara himmalska kall




Guds upprunaliga ætlan við skaparverkinum var at víðka sítt himmalska ríki til jørðina. Hansara ætlan var at stjórna tí sjónliga fysiska heiminum frá tí ósjónliga, við at tann ósjónligi livir í tí sjónliga á jørðini.

Eg og tú, sum liva í tí sjónliga fysiska heiminum, eiga at liva frá tí ósjónliga himmalska heiminum, við at tann ósjónligi „Heilagi Andin,“ Andi Guds, hevur tikið bústað í okkum. Tí kunnu tú og eg ráða á jørðini, og hetta, „sum í himli so á jørð,“ kann gerast veruleiki. Alt skaparverk Guds og krúnan á skap-

# AUGUST 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagur | 3. | | **Reingerð:** Katy og co. |
| Sunnudagur | 4. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>Møtivertar: Áshild og Eyðbjørg<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna-May<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Mariann<br>Kaffivertar: Áshild og Eyðbjørg |
| Mánadagur | 5. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| Leygardagur | 10. | | **Reingerð:** Áshild og co. |
| Sunnudagur | 11. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti – innsavnan til húsið**<br>Møtivertar: Nora, Kári og Dávid<br>Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Linda Maiken<br>Talari: Anna-May<br>Kaffivertar: Nora, Kári og Dávid |
| Mánadagur | 11. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: |
| Mikudagur | 13. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| Leygardagur | 17. | | **Reingerð:** Mariann og co. |
| Sunnudagur | 18. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>Møtivertar: No-omi, Marner, Helen og Sjúrður<br>Ábyrgd/leiðari: Mariann<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Sam<br>Kaffivertar: No-omi, Marner, Helen og Sjúrður |
| Mánadagur | 19. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: |
| Mikudagur | 21. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| Leygardagur | 24. | Kl. 10.00 | **Reingerð:** Margreth og co. |
| Sunnudagur | 25. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Fríðbjørn og Hildibrandur<br>Ábyrgd/Leiðari: Anna G.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Alex<br>Kaffivertar: Fríðbjørn og Hildibrandur |
| Mánadagur | 26. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |
| Mikudagur | 28. | Kl. 10.00 | **Bøn** |
| Leygardagur | 31. | | **Reingerð:** No-omi og vo. |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

arverkinum, menniskja, kann vera undirlagt tann himmalska heimin, og Guds dýrd kann vera sjónlig í og á menniskjunum, og alt umhvørvið rundan um okkum kann verða undirlagt hesa dýrd.

Róm 1,20 sigur: „*Ósjónliga vera Hansara, bæði æviga kraft og guddómleiki Hansara, sæst frá skapan heimsins; tað skilst av verkum Hansara; tey hava tí onga avsakan.*“

The Everyday Bible – Amplified version sigur: *Tí líka frá tí at heimurin varð skaptur, hevur ósjónliga náttúra og eginleikar Hansara, tað eru Hansara æviga kraft og guddómleiki, verði gjørd týðulig og klár at skilja, í og við verkum Hansara, so menniskjuni hava onga umbering.*

T.v.s., at tú og eg eiga at kunna skilja og umfevna tann ósjónliga himmalska heimin og Faðir okkara í himli, sum livir í tí ósjónliga. Hann eigur, í okkum og við okkum, at vera menniskjum sjónligur.

Tá ið Ádam og Eva fullu, so hevði Gud eina bjargingarætlan, og Hann sendi Jesus.

Jesus er tann fyrsti ápostulin, sum merkir sendiboð, og Hann kom við hesum boðskapinum, at Guds ríki er komið nær. Tað himmalska ríkið er aftur komið nær til okkara.

Hebrearabrævið 3,1 sigur: „*Heiløgu brøður, tit, sum hava fingið lut í himmalskum kalli, hugsið tí um ápostulin og høvuðsprestin, ið vit játta, Jesus.*“

Jesus varð sendur í henda heim at seta alt í rætt lag aftur, so tað himmalska ríkið aftur er komið okkum nær. Vit eru eitt við Faðirin, og vit koma ein dag at flyta heim til Faðirin, men inntil tá, so skulu vit vera við til at ráða yvir skaparverkinum og gera verk djevulsins til einkis í lívinum hjá menniskjum, sum eru kúgaði undir fallinum og tí gomlu natúruni.

Galatarabrævið 4,4-5 sigur: „Men tá ið fylling tíðarinnar kom, sendi Gud son Sín, føddan av kvinnu, føddan undir lóg, fyri at Hann skuldi keypa tey leys, sum undir lógini vóru, so vit skuldu fáa sonarættin.“